## Velja bróstkanningina frá



Triðja hvør kvinna í Keypmannahavn og grannakommununum sigur nei takk til tilboðið um at lata seg kanna fyri bróstkrabba. Tilboðið er partur av einari kanningarverkætlan, har allar kvinnur millum 50 og 69 ár fáa tilboð um eina sokallaða mammografi-screening, sum kann avdúka møgulig tekin um bróstkrabba. Men sambært tølum hjá Region Hovedstaden eru tað bara tveir triðingar av kvinnunum, sum taka av tilboðnum. Ein meiriluti í Fólkatinginum hevur gjørt av, at allar danskar kvinnur millum 50 og 69 ár skulu fáa tilboð um kanning.

## ES-semja um veðurlagið

Umhvørvis- og veðurlagsráðharrarnir í ES-londunum samdust í gjár um eitt felags uppskot til ST-veðurlagsráðstevnuna, sum verður í Keypmannahavn í desember. Sambært semjuni hevur ES sett sær sum mál at skerja $CO_2$-útlátið, so tað í 2050 verður millum 80 og 95 prosent av tí, sum tað var í 1990. Ráðharrarnir siga í semjuni, at í sama tíðarbili skulu flogfeløgini skerja útlátið, so tað verður 10 prosent minni enn í 2005, og útlátið hjá skipunum í ES-londunum skal verða 20 prosent minni. Uppskotið hjá ES-londunum verður lagt fyri ráðstevnuna í Keypmannahavn.

faktorur, tí siðvenjan gevur ein stabilitet og ein tryggleika. Soleiðis plaga vit at gera. Søgan er ein týðandi faktorur.

Men, legði bispur aftrat:

- Søgan sum ein forteljandi stílur uttan greining og tulking kann føra til eina enda, sum ikki er nakar "happy and", sum hann tók til.

Hann segði, at søgan er konservativ og ofta eisini afturhaldandi. Søgan vil varðveita tað verandi og tað, sum verður lagt aftrat henni, er tað, sum passar inn í myndina hjá tí, sum sigur hana.

- Ein fyritøka við virðing fyri sær sjálvari kennir sína søgu og fær hana felda niður í ein bókling ella í bevístheitina hjá fólki. Vit kunnu eisini siga, at ein fyritøka við virðing fyri sær sjálvari og sum ynskir at hava eitt langt lív lagað, setir í starv fólk sum kunnu gera, at søgan verður dagførd sum nútíðarsøga eftir nútíðar tilverugrundarlagi. Romantiskar søgur við ongum nútíðarperspektivi avspegla ein tilverutrupulleika, sum elvir til aðrar trupulleikar og tømir fyritøkuna fyri tileggjan og orku.

Bispur segði, at nýhugsan er eitt orð við ævigum núleika, tá vit skulu møta avbjóðingini og seta fokus á dagin í dag og dagin í morgin.

- Vit eiga at fremja nýhugsan við virðing fyri søguni og við virðing fyri kynstrinum at hugsa. Ein fyritøka eigur ikki at byggja tilveruna á tankaflog og ynskidreymar, men á veruleikar og greinaða kortlegging av støðuni í tjóðskaparliga og altjóða samanhanginum.

### Avbjóðingin

Jógvan Fríðriksson segði, at avbjóðingin nertir við nógv ymisk økir.

- Sjálvandi eigur ein leiðsla at vera sína ábyrgd vaksin, bæði við atliti til søgu virkisins, virðir og fakliga støði hjá arbeiðsfólkinum. Avbjóðingin viðkemur og setir krøv til bæði arbeiðsfólk, leiðslu og eigarar. Avbjóðingin krevur forstáilsi fyri hugtakinum "heildini" í fyritøkuni. Heildarhugsan kann í fyrsta umfari kennast tálmandi fyri einstøku fakbólkarnar innan ymisku økini í fyritøkuni.

Hann segði, at tað ofta hendir, at fyritøkur bert hava tveir valmøguleikar – aktivt viðspæl, sum er at møta avbjóðingini ella passiva bíðistøðu, har tú verður møttur við avbjóðingini.

- Ella sagt í einum meira positivum tónalagi, so eggjar heildarhugsanin til, at øll arbeiðsfólkini liva seg inn í søguna hjá fyritøkuni, virðini og framtíðina. Arbeiðsfólkini skulu saman við leiðsluni skriva nýggju søguna um fyritøkuna, legði hann aftrat.

Lyklaorðið, segði bispur er, at øll eru við – at øll eru bevíst um støðuna, taka felags ábyrgd og eru við til at menna eina burðardyggan gerandisdag, har fyritøkan framleiðir í takt við konjunkturin. Hugskotið um, at øll eru við – ella at "inddrage", sum Jógvan rópti tað á donskum – eigur sjálvandi at hava virðing fyri, at bæði arbeiðsfólk og fakfeløg hava sína søgu, síni virðir og lønarkrøv.

- Tá øll eru við, fáa vit eina samtalumentan, og í sínum skjøldri hevur fyritøkan tá sína søgu, síni virðir og sítt framsókni. Arbeiðsfólkið kemur við sínum søgum, sínum virðum og sínum framsókni. Í sama rúmi – og í sama forumi – verða felags áhugamálini umrødd, sum eru stimbran av fyritøkuni.

Bispur segði, at tað, at øll eru við, er tað týdningarmesta í eini fyritøku, tí tá øll eru við, letur tað upp fyri møguleikanum at tillaga.

- At øll eru við, merkir ikki, at ábyrgdin verður løgd á hillina, heldur tvørtur ímóti. Tað er her, at málið verður hildið í eygsjón, og at øll eru til reiðar at taka ímóti nýggjari og ymiskar ávirkan, sum kann tillaga tað, vit ynskja okkum.

### Avbjóðingin positiv

Jógvan Fríðriksson segði, at bygnaðurin í eini fyritøku hevur nógv til felags við bygnaðinum í einum menniskja.

- Vit hava lyndi til at sleppa okkum undan avbjóðingini, sum á nógvan hátt verður tikin sum ein trupulleiki. Spurningurin er viðkomandi, hvørt menniskjansliga "møti" við avbjóðingina er identisk við háttin, sum fyritøkan ynskir at takla avbjóðingarnar.

Bispur segði, at avbjóðingin eigur at takast sum eitt positivt upplivilsi – ella ein møguleiki. Avbjóðingin sum møguleiki eggjar til evnini í okkum at taka støðu – tað at velja millum møguleikar og skapa tilverugrundarlagið.

- Tríggjar avgerðir, sum tekur tú hvørja løtu í lívi tínum, avgera tína lagnu. Hesar tríggjar avgerðirnar avgera, hvat tú leggur til merkis, hvussu tú følir, og hvat tú gert – og ultimativt, sum Jógvan tók til, hvat tú leggur til, og hvør tú verður.

Hann helt, at fyrihalda vit okkum realistiskt til teir møguleikar, ið eru, hava vit ein rímiligan møguleika til at avgera okkara lagnu.

- Men tað hendir eisini, at vit gerast prísgivin, at okkara metingarevni og initiativ verður tileinkisgjørt í tí stóra spælinum millum kreftirnar – tær fíggjarligu kreftirnar ella náttúrukreftirnar. Tær tríggjar avgerðirnar eru eitt samanspæl millum innaru bevístheitina og fakta, sum liggur fjald ella goymd í tilverunar ytra rúmi – samfelagnum. Tað at formulera ein spurning er ein fyritreyt fyri, at tú fært rætta svarið, segði Jógvan Fríðriksson, bispur á FaroExpo ráðstevnuni í Runavík í gjár.

### Hugvekjandi fyrilestur

Fyrilesturin hjá bispi var rættiliga hugvekjandi og áhugaverdur, men hann var eisini drúgvur.

Her hava vit bert tikið ein lítlan part við av øllum tí, sum Jógvan Fríðriksson førdi fram.

Tað, at bispur helt sín fyrilestur á donskum máli, eins og aðrir fyrilestrarhaldarar eisini gjørdu, og vit nú hava týtt ein part av honum til føroyskt, vóna vit ikki ger, at hesin parturin, vit endurgeva, hevur mist alt ov nógv av sínum upprunaliga virði.




*Jógvan Fríðriksson, bispur, var stórliga fagnaður fyri sín hugvekjandi fyrilestur í Løkshøll í gjárkvøldið. Her er tað borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Magnus Rasmussen, sum heilsar bispi eftir fyrilesturin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*